Marjus Dam:

# – Politikkurin hevur givið úrslit

**Marjus Dam heldur, at góða úrslitið í veljarakanningini skyldast politikkin hjá Sambandsflokkinum. Hann heldur samstundis onga orsøk vera til at nýta úrslitið sum ein kodda**

VELJARAKANNING
*Heri á Rógvi*



*Vágafólk valdu tvær ferðir samband í veljarakanningini hjá Sosialinum og portal.fo.*

*Mynd: Jens Kristian/Álvur*

Í veljarakanningini hjá Sosialinum og portal.fo fekk Sambandsflokkurin óvanliga góða undirtøku millum vágafólk. Væl og virðiliga gav veljarakanningin Sambandsflokkinum báðar tingmenninar í Vágoynni. 47,4 prosent ella næstan onnurhvør atkvøða fer í partin hjá Sambandsflokkinum. Sum nú er eigur Sambandsflokkurin annan mannin í Vágoynni. Hin tingmannin eigur Fólkaflokkurin.

Sambandsflokkurin hevur ongantíð átt tveir tingmenn í Vágoynni, men tað hevur verið um reppið. Við valið í 1978 var Sambandsflokkurin seks atkvøður frá at fáa báðar menninar í Vágum.

Á fólkatingsvalinum seinast fekk so mikið stóra undirtøku í Vágoynni, at hetta hevði givið tveir tingmenn. Hetta hevur verið staðiliga afturvíst, men nú vísir henda seinasta veljarakanningin, at hetta kanska ikki er so heilt ómøguligt.

Marjus Dam, tingmaður fyri Sambandsflokkin í Vágoynni fegnast yvir úrslitið í veljarakanningini.

– Eg vóni, at hetta avspeglar eitt landsúrslit hjá Sambandsflokkinum. Úrslitið má fyrst og fremst skyldast tí politikki, ið flokkurin hevur ført, sigur Marjus Dam.

Hann sigur seg ikki heilt duga at siga, hvør orsøkin er til, at flokkurin hjá honum fær so stóra undirtøku í Vágoynni.

– Sambandsflokkurin fær góðan stuðul í Vágoynni. Eg haldi, at vágafólk hava fingið eyguni upp fyri, hvat tað er sum hendir í serliga fullveldismálinum, sigur Marjus Dam.

Vágatingmaður heldur, at hetta komandi løgtingsvalið er at meta sum eitt val millum loysing og samband.

Tá vit spyrja eftir, um fasta sambandið um Vestmannasund hevur ávirkað gongdina á politiska pallinum, so heldur hann ikki, at hesin gevur tað stóra útslagið hesaferð.

– Allir flokkar hava verið fyri undirsjóvartunnilinum. Tað kjakið, sum var, hevur lagt seg aftur. Tað er kanska meira flogvøllurin, sum upptekur fólk. Á hesum økinum hevur samgongu ført ein sovorðnan politikk, soleiðis at fólk ikki vita, um tey eru keypt ella seld, sigur Marjus Dam.

Hóast góða úrslitið í veljara, so ætlar Marjus ikki at liggja á teirri lætu síðuni, men nú skulu øll segl seta til, sigur hann.

– Hvør einasti sambandsveljari má gera sítt valdagin, sigur Marjus Dam.

Annars er Marjus Dam ikki nøgdur við úrslitið í Suðurstreymoy. Hann heldur tað vera sera løgið, at fólk, sum arbeiða hjá tí almenna, velja at stuðla Tjóðveldisflokkinum, tá tað er blokkstuðulin, ið fíggjar tað mesta av tí almenna virkseminum í høvuðsstaðnum.




# Valevnalistarnir latast inn í dag

**Í dag er síðsta freist at lata inn velevnalistarnar til løgtingsvalið**

LØGTINGSVAL
*Heri á Rógvi*

Løgtingsval er sett at vera 30. apríl. Hetta merkir, at valevnalistar skulu gerast. Teir fýra stóru flokkarnar eru allir lidnir við sína uppstilling, men teir smærru flokkarnir, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hava ikki almannakunngjørt allar sínar uppstillingar enn.

Í dag, týsdagin, fellur hamarin. Tað er soleiðis, at løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya Løgting stendur at lesa, at valevnislitar skul latast inn tríggjar vikur frammanundan valdagin, og tað er í kvøld.

– Valevnislistarnir mugu vera formanninum í avvarðandi løgtingsvalnevnd í hendi í seinasta lagi kl. 18.00 3 vikur frammanundan valdegnum.

Sum áður nevnt hava teir størru flokkarnir longu almannakunngjørt teirra valevnalistar í øllum valdømunum.

Miðflokkurin almannakunnger sínar valevnalistar í dag (eftir at blaðið fór til prentingar). Eftir hvat skilst, stillar Miðflokkurin upp í øllum valdømum.

Sjálvstýrisflokkurin hevur higartil almannakunngjørt sínar valevnalistar í Norðoyggjum og Eysturoynni.

Eyðun Elttør, formaður fyri Sjálvstýrisflokkin, sigur, at tað gongur framá hjá teimum við uppstillingini. Teir fáa tað síðsta upp á pláss, áðrenn kl. 18.00. Enn er ikki heilt vist, um teir upp í øllum valdømum enn.



# Stórar broytingar í tingmannabýtinum

**Seinasta veljarakanningin, sum Fynd gjørdi fyri Sosialin og www.portal.fo vísir, at væntast kunnu stórar broytingar á tingi. Vit hava borið saman úrslitini frá tveimum teimum seinastu valunum við kanningina**

VELJARAKANNING
*Eirikur Lindenskov*

Sambært nýggjastu veljarakanningini, sum Fynd gjørdi fyri Sosialin og Portal.fo í síðstu viku kunnu væntast stórar broytingar í býtinum av tingumboðum.

Fyri tað fysta vísir kanningin, at bert fýra flokkar verða umboðaðir á tingi, og at vit fyri fyrstu ferð síðani vallógin kom í gildi í 1978 bert fara at hava 30 tingmenn.

Eftir galdandi skipan skulu veljast 27 valdømisvald tingfólk og fimm eykavald. Tað merkir, at fýra umboða Suðuroayar valdømi, tvey umboða tey smáu valdømini: Sandoyar Sýslu valdømi, Vága valdømi og Norðurstreymoyar valdømi. Átta umboða Suðurstreymoyar valdømi, fimm Eysturoyar valdømi og fýra Norðoya valdømi.

Teir flokkar, sum verða undirumboðaðir á tingi, t. v. s., at teirra prosentvísi partur av tingumboðum verður lægri enn prosentparturin teir hava av samlaða atkvøðutalinum, fáa tillutað eykamandat har, sum flestar atkvøður »leypa av«.

Sum oftast eru tað teir smærru flokkarnir, sum fara við hesum umboðum. T. d. eru bæði Helena Dam á Neystabø og Sámal Petur í Grund eykavald ávikavist í Suðurstreymoyar valdømi og í Eysturoyar Valdømi. Somuleiðis er Jenis av Rana eykavaldur í Suðurstreymoy. Á seinasta vali vóru Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin somuleiðis »undirumboðaðir« á tingi, og fingu tí tillutað hvør sítt eykamandat, ávikavist Heðin Mortensen í Suðurstreymoy og Hans Pauli Strøm í Norðurstreymoy.

Sambært veljarakanningini í síðstu viku er tað bara Fólkaflokkurin, sum er undirumboðaður. Hann fær einans 11,1% av valdømisvaldu tingsessunum, meðan hann í kanningini fær 18.7% av atkvøðunum. Hetta gevur honum heili trý eykamandat.

Tað er kortini ikki heilt greitt, hvar hesi fella, men nógvar atkvøður loypa av í Suðurstreymoy, og tað kundi givið flokkinum tvey eykaumboð úr Suðurstreymoy, og nógvar atkvøður loypa eisini av í Norðoyggjum. Men hetta er kortini ikki neyvt roknað út í kanningini.

Í talvunum á hesi síðu ber til at bera saman úrslitini í hvørjum valdømi sær við valini í 1994 og í 1998 og kanningina í síðstu viku. Stórar flytingar eru. Eitt nú klárar Sambandsflokkurin at vinna sær tingmann í Norðoyggjum, sum hann ikki hevur havt í fleiri mannaminni. Hann fær eisini aftur mannin í Norðurstreymoy, sum hann hevur havt síðani 1906 við undantaki av hesum valskeiðnum.

Í Vágunum ger Sambandsflokkurin eitt gott hál og fær báðar menninar, og í Suðuroy vantar lítið í át flokkurin eisini fær tveir mans valdar.

Hjá Fólkaflokkinum gongur illa. Hann missir mannin í Vágunum og á Sandi, missir annan mannin í Havn og annan í Norðoyggjum. Á Sandi gongur so illa, at Sambandsflokkurin fer fram um Fólkaflokkin.

Tjóðveldisflokkurin stendur sum so í stað, har henda ongar flytingar. Javnaðarflokurin stendur eisini í stað, tó at flokkurin missir eykavalda mannin í Norðurstreymoy og vinnur aftur valdømisvalda mannin á Sandoynni.

Viðmerkjast skal, at úrslitini hjá Kristiliga Fólkaflokkinum og hjá Verkamannafylkingini ikki eru tikin við í talvurnar, og tí vanta teirra umboð í tølunum frá valinum í 1994.

**Noroya valdømi**

| Flokkur | 1994 | 1998 | 2002 (kanning) |
|---|---|---|---|
| A | 22,0 (1) | 28,5 (2) | 27,7 (1) |
| B | 7,5 | 12,2 | 17,4 (1) |
| C | 12,5 (1) | 17,6 (1) | 20,9 (1) |
| D | 13,2 (1) | 10,5 | 8,1 |
| E | 20,2 (1) | 26,1 (1) | 24,0 (1) |
| H | 2,4 | 1,7 | 1,9 |

**Eysturoyar valdømi**

| Flokkur | 1994 | 1998 | 2002 (kanning) |
|---|---|---|---|
| A | 14,7 (1) | 17,9 (1) | 18,8 (1) |
| B | 27,9 (2) | 25,3 (2) | 33,6 (2) |
| C | 9,2 | 15,1 (1) | 21,1 (1) |
| D | 5,8 | 11,7 | 2,6 |
| E | 11,3 (1) | 19,4 (1) | 22,5 (1) |
| H | 8,6 | 5,8 | 1,4 |

**Norðurstreymoyar valdømi**

| Flokkur | 1994 | 1998 | 2002 (kanning) |
|---|---|---|---|
| A | 12,9 | 22,4 (1) | 17,4 |
| B | 15,4 (1) | 20,7 | 30,7 (1) |
| C | 9,2 | 15,1 | 18,6 |
| D | 4,3 | 4,3 | 1,8 |
| E | 16,5 (1) | 28,1 (1) | 28,9 (1) |
| H | 4,6 | 2,3 | 2,7 |

**Suðurstreymoyar valdømi:**

| Flokkur | 1994 | 1998 | 2002 (kanning) |
|---|---|---|---|
| A | 15,7 (2) | 20,9 (2) | 19,9 (1) |
| B | 24,8 (3) | 16,9 (1) | 23,1 (2) |
| C | 13,3 (1) | 21,0 (2) | 20,8 (2) |
| D | 5,6 | 6,7 | 2,0 |
| E | 12,9 (1) | 28,0 (3) | 31,5 (3) |
| H | 5,9 | 4,8 | 2,6 |

**Vága valdømi:**

| Flokkur | 1994 | 1998 | 2002 (kanning) |
|---|---|---|---|
| A | 23,4 (1) | 25,4 (1) | 15,3 |
| B | 32,8 (1) | 28,2 (1) | 47,4 (2) |
| C | 13,3 | 17,8 | 14,7 |
| D | 1,5 | 12,9 | 1,4 |
| E | 8,8 | 10,4 | 17,4 |
| H | 8,9 | 4,4 | 3,8 |

**Sandoyar Sýslu valdømi**

| Flokkur | 1994 | 1998 | 2002 (kanning) |
|---|---|---|---|
| A | 32,2 (1) | 29,7 (1) | 18,4 |
| B | 12,4 | 9,8 | 20,2 |
| C | 24,7 (1) | 28,1 | 30,4 (1) |
| D | 1,1 | 1,5 | 0,6 |
| E | 21,5 | 29,2 (1) | 30,1 (1) |
| H | 6,0 | 1,6 | 0,3 |

**Suðuroyar valdømi:**

| Flokkur | 1994 | 1998 | 2002 (kanning) |
|---|---|---|---|
| A | 6,0 | 15,1 | 7,1 |
| B | 19,1 (1) | 15,2 (1) | 33,4 (1) |
| C | 32,6 (2) | 43,3 (2) | 40,8 (2) |
| D | 1,6 | 1,2 | 0,5 |
| E | 11,8 | 19,2 (1) | 17,0 (1) |
| H | 3,7 | 2,8 | 1,1 |

Talvan vísir býtið av umdømisvaldu tingfólkunum sambært seinastu kanningini og løgtingsvalunum í 1994 og í 1998. Sambært kanningini verða trý eykavald umboð, sum øll fella til Fólkaflokkin. Við valið í 1998 fekk Sjálvstýrisflokkurin tvey eykavald umboð, Miðflokkurin, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hvør sítt.

# Meiri enn helmingurin av landsstýrismonnunum koma ikki á ting

**Sambært veljarakanningini er tað bert Høgni Hoydal, landsstýrismaður, sum kann kenna seg vísan í at verða valdur á ting á løgtingsvalinum 30. apríl. Jørgen Niclasen fær dyggasta smeitin, tí Fólkaflokkurin fær eitt sera ringt val í Vágunum**

VELJARAKANNING
*Eirikur Lindenskov*

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, fær ein dygggan framman á í nýggjastu veljarakanningini. Sambært henni kann hann gloyma alt um at verða afturvaldur á ting, og fyri fyrstu ferð síðani 1954 stendur Tjóðveldisflokkurin seg so mikið væl í Vágunum, at hann stendur til at fáa mannin, sum Sambandsflokkurin ikki fær so risa stóra framgongd, sum kanningin vísir.

Tjóðveldisflokkurin stendur til at fáa tríggjar valdømisvaldar tingmenn í Suðurstreymi. Tí kann við rímuligari vissu staðfestast, at Høgni Hoydal verður afturvaldur á ting.

Fólkaflokkurin missir annan av teimum báðum valdømisvaldu tingmonnunum, flokkurin hevur í Norðoya valdømi. Vit kunnu tó gita, at Anfinn Kallsberg dregur longra stráið, og at tað verður Jógvan við Keldu sum fellir. Í løtuni situr Rúna Sivertsen á tingi fyri Anfinn Kallsberg, løgmann. Hon skal ikki vænta sær tingsess.

Fólkaflokkurin stendur eisini til at missa annan av teimum báðum valdømisvaldu tingmonnunum hjá flokkinum í Suðurstreymi. Seinast var Óli Breckmann fyrstvaldur, men Bjarni Djurholm var dygst í hølunum á honum. Ivasamt er, hvør teirra verður valdur.

Tjóðveldisflokkurin fær ein valdømisvaldan í Norðoyggjum. Síðani 1984 hevur Heini O. Heinesen umboðað flokkin har, og hann hevur verið sera sterkur. Men Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri stillar eisini upp har, so spennandi verður í øllum førum at síggja, hvør teirr vinnur sessin. Seinast hevði Heini O. Heinesen 514 persónligar atkvøður, meðan Karsten Hansen hevði 146.

Sámal Petur í Grund hevur sambært kanningini ongan lívsins kjans at vinna sær tingsess. Um so verður, at flokkurin vinnur upp um sperrumarkið upp á 3,7%, so verður tað helst Eyðun Elttør, floksformaður, sum fær sessin, tí flokkurin er nógv sterkastur i Norðoyggjum, har hann fær 8,1%. Tó er at viðmerkja, at uppstillingin hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymoy ikki er liðug, og her kunnu verða fleiri atkvøður at heinta. Í Eysturoynni hjá Sámal Petur í Grund fær flokkurin bert 2,6%.

Óli Holm, landsstýrismaður Tjóðveldisfloksins, stillar ikki upp.

